# Lydia letur salongina frá sær

**Nærum 40 ára gamla Hárfríðkanarhøllin hjá Lydiu Danielsen skiftir nú eigarar. Lydia letur í næstum Siri Ann Persson og Ann Petersen, sum hava arbeitt hjá henni í longri tíð, taka yvir**

FRISØRYRKI
*Eydna Skaale*
*eydna@sosialurin.fo*

– Í ár verða tað 47 ár síðani eg fór í læru. Man trýr ikki hvussu skjótt tíðin gongur, staðfestir Lydia Danielsen, sum eftir 39 ár við egnari salong nú letur yngri kreftir taka yvir.

Í síni tíð fór hon í læru hjá Missu Mortensen á Tvøroyri. So skjótt lærutíðin var liðug kom hon til Havnar, og brátt lat hon egna salong upp í Skákinum. Eftir 18 ár flutti hon í Gundadal, har Hárfríðkanarhøllin hevur hildið til seinastu 21 árini.

Og tað hava nógv fólk verið knýtt at salongini. Bæði lærlingar, útbúnir sveinar og ikki at gloyma allar teir føstu kundarnar, sum trúliga eru komnir til salongina hjá Lydiu at klippa sær øll hesi árini.

Men Lydia ber ongan ótta fyri kundunum.

– Tær hava yvirtikið kundarnar hjá mær so við og við, so tað er fínasta slag. Eg fari eisini framyvir at vera her ein dag um vikuna og klippa, so eg sleppi tí ikki heilt. Tá kann eg kanska taka nakrar av mínum gomlu kundum. Men teir eru allir í góðum hondum hjá teimum, sum taka yvir, slær Lydia fast.

Hon er ikki bangin fyri, hvussu tíðin skal ganga, nú hon letur salongina frá sær.

– Eg havi nógv ommubørn, og tað hevur altíð verið nógv, sum man ikki hevur fingið tíð til. So eg eri ikki bangin fyri at fáa tíðina at ganga, sigur hon við einum smíli.

### Siri Ann og Ann

Mánadagin 1. mei taka Siri Ann Persson og Ann Petersen yvir á salongini. Og tær eru sera vónríkar.

– Hetta er jú næstan ein 40 ára gomul salong, so alt grundarbeiðið er lagt. Vit taka yvir á eini vælkoyrandi fyritøku, sum hevur sín fasta kundaskarða. Og vit ætla eisini framyvir at koyra víðari í tí góða og lætta andanum, sum Lydia hevur lagt so stóran dent á. Tað verður ikki nøkur kollveltandi broyting, hóast vit taka yvir, siga tær.

Tær siga tó, at tær eru frá einum yngri ættarliði, og at tær eisini framyvir fara at marknaðarføra salongina hareftir.

– Sjálvandi fara vit eisini at royna at fanga ungar, nýggjar kundar. Vit eru ofta á skeið, og fylgja væl við nýggjasta hármótanum allatíðina. Men hetta er ein familjusalong, har øll ættarlið koma at gera hárið, greiða tær frá.

Spurdar um ikki kappingin er harðnað seinastu árini, nú frisørsalongir at kalla eru á hvørjum horni, svara tær, at tað hava tær ikki merkt nakað til.

– Tað kann væl vera, at tað eru fleiri salongir, men tað eru eisini færri sveinar sum arbeiða á hvørjari salong. Fyrr vóru fáar salongir, við nógvum sveinum, og tí merkist tað ikki í so stóran mun. Men fólk leggja nógv meiri í hárið nú. Serliga tey ungu. Og tey vilja fegin gjalda kostnaðin av at fylgja við rákinum, siga Siri Ann og Ann.

Hóast tær nú taka yvir, so fegnast tær um, at Lydia ikki gevst heilt, men at hon eisini framyvir fer at arbeiða ein dag um vikuna.

– Tað vilja vit fegnar hava. Og vit síggja tað sum ein fyrimun. Fólk eru von við at hon er her, og hon gongur eisini og ger tað hugnaligt hjá okkum. So vit eru glaðar fyri, at hon ikki sleppur hesum heilt, siga tær, sum við ein munn.

Í sambandi við eigaraskiftið av Hárfríðkanarhøllini, verður móttøka í salongini mánadagin 2. mei, frá kl 13-17.



*Frá vinstru: Ann Petersen, Lydia Danielsen og Siri Ann Persson. Eftir at hava rikið Hárfríðkanarhøllina í 39 ár, fer Lydia nú so smátt at pakka saksarnar saman. Hon letur yngra ættarliðið taka við, men verður tó til arbeiðis ein dag um vikuna framyvir*

*Mynd: Bárður Lydersen*

# Hava fingið væl burtur úr í Brússel

**Fyri fyrstu ferð er Kovin í Sandavági við á stóru evropeisku fiskavørframsýningini European Seafood Exhibition í Brússel, og stjórin á Kovanum, Ari Thomassen, letur væl at úrslitinum higartil**

HANDILSAVTALUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Talan er um 13. útgávuni av stóru fiskavøruframsýningini, og føroyingar hava øll árini tikið lut á framsýningini. Í nógv ár hevur Menningarstovan staðið fyri einum felags bási hjá flestu føroysku luttakarunum, og soleiðis er eisini í ár. Ein av føroysku luttakarunum er Kovin úr Sandavági, sum fyri fyrstu ferð er við.

### Havi fingið fleiri sáttmálar

Ari Thomassen, stjóri á Kovanum, lat væl at framsýningini, tá ið vit høvdu hann í telefonini úr Brússel mikudagin.

- Tað hevur gingið heilt væl. Áhugin fyri teimum føroysku vørunum hevur verið stórur, og nógvir keyparar hava sýnt vørunum hjá okkum áhuga, sigur Ari Thomassen.

Spurdur um tað eru nakrar ávísar framleiðslur, ið útlendsku keypararnir hava sýnt áhuga, sigur Ari Thomassen:

- Tað er eitt sindur av eftirspurningi eftir rækjum, og eisini eitt sindur eftir rognunum. Men tað hevur eisini verið rættuliga stórur áhugi fyri toskalivur, men har er trupulleikin tann, at vit hava alt ov lítið av ráværu, greiðir Ari Thomassen frá í telefonini úr Belgia.

Stjórin á Kovanum sigur, at tað er komnir nakrir sølusáttmálar í lag burtur úr mongu vitjanunum á føroyska básinum, og hann fegnast um úrslitið higartil, sum hann sigur verða betur enn væntað. Ari Thomassen sigur eisini, at tað hevur verið rættuliga fitt av fólki á vitjan á føroyska básinum og hugt at føroysku vørunum. Fleiri av hesum hava eisini fingið kunning um føroysku fyritøkurnar, og vónandi spyrst okkurt burtur úr hesum eisini.



ÁRSAÐALFUNDUR

**Boðað verður til ársaðalfundar í Ognarfelag Tryggingartakaranna fríggjadagin 13. mai, kl. 17 á Hotel Føroyum**

Dagsskrá:

1. Frágreiðing frá nevndini um virki felagsins í 2004
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar og hvussu avlop sambært roknskapinum verður nýtt, sí § 29, stk. 3, í viðtøkum felagsins
3. Val av nevndarlimum
4. Val av grannskoðarum
5. Møgulig uppskot, ið nevndin, stjórnin ella umboðsfólk ynskja at viðgera
6. Ymiskt

Allir tryggingartakarar í P/F Tryggingarfelagnum Føroyum eru limir í felagnum og hava rætt til at møta á aðalfundinum, men skulu í seinasta lagi 5 dagar frammanundan aðalfundinum skrivliga boða høvuðsskrivstovu felagsins frá luttøku.

Tórshavn, tann 28. apríl 2005
Nevndin

OGNARFELAG
TRYGGINGARTAKARANNA

Kongabrúgvin · Postsmoga 329 · FO-110 Tórshavn · Tel 345600 · Faks 345601 · tf@trygging.fo · www.trygging.fo